**Fuglafjarðar kommuna**

| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 21. juni 2012 |
| Býráðsfundur nr. | 08/2012 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Marin Sólheim Thomsen |
| | |

Ár 2012 tann 21. juni kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 14. mai 2012 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus S. Midjord
Petur Abrahamsen
Bjørghild Arnholdtsdóttir

Bjørghild Arnholdtsdóttir møtti sum varalimur fyri Sonna á Horni, sum er burturstaddur. Hann hevur annars heitt á borgarstjóran um at innkalla varalimin sína vegna.

**Skrivari:** Marin Sólheim Thomsen, fíggjarleiðari

**Mál nr. 24/2012.**

**Viðvíkjand mál um framhaldandi arbeiði hjá søgubólkinum.**

Býráðsleiðslan hevur tann 11. juni 2012 havt fund við formannin í søgubólinum fyri Fuglafjarðar søgu, hetta sambært áheitan frá hesum vegna bólkin um fund við borgarstjóran, somuleiðis sum Steffen Stumann Hansen eisini var við á fundinum.

Vísandi til fundarfrásøgnina so hevur søgubólkurin havt fund við Steffen Stumann Hansen, søgufrøðing, um hann møguliga hevur áhuga til at taka upp arbeiðið eftir Freydis Poulsen, sálu, so gongd aftur kundi verða sett á arbeiðið við einum samskipara/radaktøri.

Mett verður, at orka fyrst og fremst mátti verða løgd í at kanna og seta seg inn í arbeiðið hjá Freydis, og at koma við einum statusi upp fyri alt arbeiðið, sum gjørt er hjá søgubólkinum fram til dags dato.

Steffen, sum annars hevur verið við til at skriva bygdasøgur, upplýsti, at hann fyribils kundi átaka sær arbeiðið við at gera status, skriviarbeiði og radaktørarbeiði, og kom hetta arbeiðið fyribils at taka umleið 4 mánaðar, og kundi hann byrja beinanvegin.

Viðvíkjandi lønini verður nevnt í notatinum, at hann er limur í Magistarafelag Føroya, og løn hansara er á hægsta stigi, íroknað øll gjøld kr. 50.000,00 um mánaðan. Hann metir tó, at hann kemur at arbeiða ½ tíð í hesar 4 mánaðarnar við eini mánaðaløn upp á kr. 25.000,00 ella tilsamans kr. 100.000,00.

Annars varð eisini komið inn á viðurskiftini viðvíkjandi søgubólkinum sjálvum, sum býráðið valdi á skipanarfundinum 29. desember 2008. Í bólkin vórðu vald:

- Arne Nørrevang
- Petur Martin Petersen
- Freydis Poulsen
- Frits Johannesen
- Jann Toftegaard
- Fritleiv Joensen
- Ditlev Róin

Støðan ídag er tann, at Freydis Poulsen er farin, meðan Arne Nørrevang ikki luttekur í arbeiðinum. Staðfest er somuleiðis, at Jóna Lindenskov, sum ger eitt megnar arbeiði, ikki er limur í søgubólkinum, men bert hevur luttikið av áhuga fyri søguskrivingini um heimbygd hennara.

Tí verður neyðugt at velja 2 nýggjar limir í søgubólkin fyri restina av hesum vaksleiðið, t.v.s. fram til 31. desember 2012.

Á sjálvum fundinum upplýsti borgarstjórin, at hann ikki sjálvur kundi taka støðu til málið, men at hann skuldi venda sær til mentamálanevndina, sum umsitir mentanina, og sum tessvegna eisini hevur játtanina til bygdasøguna sum sítt málsøki.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini 13. juni 2012. Borgarstjórin møtti á fundinum og gav nevndini frágreiðing um málið, somuleiðis sum hann las notatið frá 11. juni 2012 upp fyri nevndarlimunum. Áðrenn viðgerðin byrjaði fór hann av fundinum og lat málið yvir til nevndina til støðutakan.

***Tilmæli um samskiparan:***
Ein meiriluti í nevndini Eyðun á Lakjuni og Petur Abrahamsen mælir býráðnum til, at Steffen Stumann Hansen kemur at taka sær av arbeiðinum fyri søgubólkin í 4 mánaðar fyri at koma við einum statusi yvir arbeiðið, sum gjørt er bæði av Freydis Poulsen, Jónu Lindenskov og hjá søgubólkinum sjálvum. Somuleiðis skal hann eisini í hesi tíðini taka sær av skrivi- og redaktiónsarbeiðinum.

Meirilutin mælir til, at viðkomandi verður løntur við kr. 25.000,00 um mánaða, sum er løn fyri ½ tíð, og at samlaðu lønarútreiðslur hansara fyri tíðarskeiðið verða kr. 100.000,00, sum tiknar verða av rakstrarstaði 05.24.13.520.20 "Kunning um kommununa" konto 140001, har avsettar eru kr. 150.000,00 fyri 2012.

Støða verður tikin eftir, at teir 4 mánaðarnir eru farnir, hvussu arbeiðið víðari skal verða skipað.

Ein minniluti Kristina Toftegaard Larsen tekur fyribils ikki undir við málinum, við tað at hetta ikki er búgvið til støðutakan. Hon metir serg ikki hava fingið neyðuga kunning, so hon kundi havt møguleikar fyri at seta seg nærri inn í málið. Hon er fyrstu ferð kunnað um viðurskiftini frá borgarstjóranum á nevnadrfundinum.

***Tilmæli um val av limum í søgubólkin:***

Nevndin mælir býráðnum til, at nýggir limir verður valdir fyri teir frammanfyri nevndu, t.v.s. 2, ávikavist fyri Freydis Poulsen og Arna Nørrevang fyri tíðarskeiðið fram til 31. desember 2012.

Nevndin hevur einki uppskot við í tilmælinum, men skulu nevndarlimirnir hvør sær umhugsað síni uppskot. Miðað verður fram ímóti, at nevndin kemur við uppskoti um limirnar í søgubólkin áðrenn ella til býráðsfundin 21. juni 2012.

**Avgerð á býráðsfundi:** Býráðið samtykti einmælt at biðja Steffen Stumann Hansen taka arbeiðið upp eftir Freydis Poulsen, sálu, og at arbeiðið skal gerast innan 4 mánaðar. (9-0)
4 persónar vóru í uppskoti sum limir í søgubólkinum. Steffen Stumann Hansen, Jóna Lindenskov, Niels Midjord og Kathrina við Gjónna. Ein meiriluti av býðráðnum samtykti at velja Steffen Stumann Hansen og Jónu Lindenskov í søgubólkin.

**Mál nr. 25/2012.**

**Umsókn frá Fuglafjarðar billiardfelag um skattafrælsi.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Taks, dagfest 31. mai 2012 í sambandi við ummæli kommununar til umsókn frá Fuglafjarðar billiardfelag um skattafrælsi fyri teirra virksemi.

Taks-ráðið hevur heimild sambært skattalógina at játta skattafrælsi til feløg og stovnar vm, um so er, at inntøkan eftir stovnanarskipan, lógum og samtyktum, einans skal verða nýtt til alment góðgerin ella kirkjulig, manngóð, listarlig, vísindalig ella tílík endamál, hetta sambært § 3, stk. 3.

Vísandi til, at Taks-ráðið áðrenn avgerð um skattafrælsi verður tikin í málinum, vil hava álit í hesum føri frá Fuglafjarðar býráði í málinum, so varð málið lagt fyri fíggjarnevndina til ummælis. Hjálagt er avrit av "Reglugerð fyri Fuglafjarðar billiardfelag".

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini 14. juni 2012 og mælir nevndin býráðnum til at viðmæla yvir fyri Taks, at skattafrælsið verður veitt Fuglafjarðar billiardfelag av virksemi sínum.

**Avgerð á býráðsfundi: Býráðið samtykti at taka undir við fíggjarnevndini og viðmæla skattafrælsi til Billiardfelagið yvir fyri Taks-ráðnum. (9-0)**

**Mál nr. 26/2012**

**Umsókn frá ÍF flogbólti um skattafrælsi.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Taks, dagfest 31. mai 2012 í sambandi við ummæli kommununar til umsókn frá ÍF flogbólti um skattafrælsi fyri teirra virksemi.

Taks-ráðið hevur heimild sambært skattalógina at játta skattafrælsi til feløg og stovnar vm, um so er, at inntøkan eftir stovnanarskipan, lógum og samtyktum, einans skal verða nýtt til alment góðgerin ella kirkjulig, manngóð, listarlig, vísindalig ella tílík endamál, hetta sambært § 3, stk. 3.

Vísandi til, at Taks-ráðið áðrenn avgerð um skattafrælsi verður tikin í málinum, vil hava álit í hesum føri frá Fuglafjarðar býráði í málinum, so varð málið lagt fyri fíggjarnevndina til ummælis. Hjálagt er avrit av "Viðtøkum fyri ÍF flogbólt".

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini 14. juni 2012 og mælir nevndin býráðnum til at viðmæla yvir fyri Taks, at skattafrælsið verður veitt ÍF flogbólti av virksemi sínum.

**Avgerð á býráðsfundi: Býráðið samtykti at taka undir við fíggjarnevndini og viðmæla skattafrælsi til ÍF Flogbólt yvir fyri Taks-ráðnum. (9-0)**

**Mál nr. 27/2012**

**Mál viðvíkjandi vali av umboði í starvsbólk í sambandi við eldraøkið.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið teldupost frá Runavíkar kommunu, dagfestur 14. juni 2012, har teir 5 borgarstjórarnir í Eysturoy verða innkallaðir til fundar á býráðsskrivstovuni hjá Runavíkar kommunu mánadagin 18. juni 2012.

Í hesum sambandi verður víst til skriv frá Almannamálaráðnum, dagfest 09. juni 2012 og teldupost fra sama ráði, dagfestur 13. juni 2012, har heitt verður á størstu kommununa í økinum um at kalla saman til fundar fyri at viðgerða samansetingina av bólkinum, og at koma við uppskotum hvør sær til lim í starvsbólkin, sum bý- og bygdaráðini síðan skulu viðgerða og taka avgerð um.

Fyri Eysturoyar økið verður talan um starvsbólk við 6 umboðum, og á fundinum millum borgarstjórarnar tann 18. juni 2012 varð semja um, at Fuglafjarðar-Eystur-Nes- og Sjóvar kommmunur fáa eitt umboð hvør, meðan Runavíkar kommuna fær 2 umboð.

Arbeiðsuppgávan verður millum annað at lýsa eldraøkið í Eysturoynni – Sunda- og Eiðis kommunur.

Borgarstorin mælir býráðnum til at velja Elisabeth D. Eldevig sum kommununar umboð í starvsbólkin, sum skal verða liðugur við sítt arbeiði 01. november 2021, meðan fráboðanin um, hvussu starvsbólkurin hevur skipað seg, skal verða Almannamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 25. juni 2012.

Sosiala nevndin er á fundi tann 19. juni 2012 kunnað av borgarstjóranum um málið og tilmæli hansara til býráðið, og tekur nevndin fult undir við tilmæli hansara um at velja Elisabeth D. Eldevig, forkvinnu í sosialu nevndini sum kommununar lim í starvsbólkin.

**Avgerð á býráðsfundi:** Býráðið samtykti at taka undir við tilmælinum frá borgarstjóranum og sosialu nevndini at velja Elisabeth D. Eldevig, forkvinnu í sosialu nevndini sum kommununar lim í starvsbólkin. **(9-0)**

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18,00

Dánjal Vang

Jann Toftegaard

Elisabeth D. Eldevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus S. Midjord

Bjørghild Arnholdtsdóttir

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Marin S. Thomsen